Argjar 175 ár

Tann 9. mai í 1828 keypti Andrass Mortansson ognirnar hjá spitalskhospitalinum á Argjum – og er tað dagurin, Argjar vórðu bygdar

BYGDARSØGA
Eirikur Lindenskov

Í dag er stórur dagur á Argjum, tí í dag eru liðin 175 ár síðani, at Argjar vórðu bygdar.

Tað var Andrass Mortansson, sum keypti Argjar tann 9. mai í 1828.

Andrass Mortansson var føddur í Hvalba í 1794. Hann giftist Elspu Dánjalsdóttir av Kjalnesi í Kollafirði.

Argir er helst millum elstu bygdir í Føroyum. At garður hevur veirð á Argjum í víkingaøldini (800-1035) helt Sverri Dahl, fornfrøðingur vera ivaleyst. Hann bygdi sína hugsan á tað úrslit, sum Christian Matras kom til viðvíkjandi sjálvum navninum.

Hann helt navnið vera komið úr gæliskum, og at tað var nýtt um ár 900 av norrønum monnum í teimum londum, teir bygdu fyri vestan. Hesum greiðir Niels Juel Arge, sum var oldurabbasonur Andrass Mortansson frá í bók síni »Argjamenn, ein ættarsøga«.

Hvat, ið hevur fyrifarist á Argjum í Víkingaøld til 16. øld, vita vit einki um, men í 1547 fáa vit at vita, at har er eitt hospital fyri spitølsk.

Tað eru leivdirnar av hospitalinum og jørð tess, sum Andrass Mortansson keypir 9. mai í 1828.

Ognirnar hjá hospitalinum og tær fýra hagaleysu merkurnar á Argjum vórðu seldar á uppboði fyri 1005 ríkisdálar til Andrass Mortanson á Kjalnesi og hálvmørkin í Tjørnuvík til tjørnuvíking fyri 320 ríkisdálar. Tilsamans gav handilin 1325 ríkisdálar.

Árið eftir stóð hospitalið í Lágabø, vanliga nevnt Gamla Hospital í Havn, liðugt. Tað kostaði 1445 ríkisdálar og 16 skinn.

Sostatt fingu føroyingar nærum eitt nýtímans – eftir tátíðarmetum – sjúkrahús fyri pengarnar, sum Andrass Mortansson rindaði fyri ognirnar á Argjum.

81 ára gamli Sverri Mortensen á Argjum er oldurabbasonur Andrass Mortansson. Tey vóru 12 systkin, trý teirra eru eftir á lívi. Sverri Mortensen, Jóhannes Mortensen og Maja Dalsgarð. 9. mai í 1948 reistu eftirkomarar hjá Andrassi Mortansson honum minnisvarða

Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá okkara kæri pápi, verfaðir, abbi, langabbi, bróðir og vinur mín

Robert Brockie
Tórshavn

doyði og varð jarðaður.

Tøkk til starvsfólkið á B 7 á Landssjúkrahúsinum.
Tøkk til Kjartan Mørkøre, prest, fyri góð og troystarrík orð.
Tøkk til sangarar, kirkjutænarar, gravarar og øll tykkum,ið hjálptu til við jarðarferðina.
Tøkk fyri blómur og kransar, tøkk til tykkum,ið ringdu, og tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

Hjartans tøkk øll somul.

Fyri tey avvarðandi
Alan, Derek, Edna, Robbie, Ian og Frynhild

Stór Hvítusunnustevna á Hálsi

SAMKOMA
Tíðindi frá Karisma

Sum tey undanfarnu árini, so skipar evangeliska samtakið Karisma fyri stórari stevnu á Hvítusunnu í Ítróttarhøllini á Nabb. Henda verður í døgunum 6. - 9. juni. Hetta er vanliga ein stevna, ið samlar hópin av fólki frá nær og fjar. Nakrir av talarunum, ið hava verið áður, eru nøvn sum: Aril Edvardsen, Enevald Flåten, Christian Hedegård o.a.

Uppleggið í ár er eitt sindur øðrvísi við tað, at ongin útlendingur verður við hesaferð sum talari. Talararnir, ið koma at vera við á stevnuni verða: Jón Miðberg, Símun Jacobsen, Dánjal á Dul Jacobsen, Fríðtór Debes, Tummas Jacobsen, Pauli Høj o.a.

Talarar á Hvítusunnustevnuni á Hálsi verða m. a. Jón Miðberg, Símun Jacobsen, Dánjal á Dul Jacobsen, Fríðtór Debes, Tummas Jacobsen, Pauli Høj o.a.

Sum nakað nýtt er ætlanin at byrja stevnuna fríggjakvøldið 6. juni við einum stórum sangkvøldið - har nógvur og fjølbroyttur sangur verður fyri bæði ung sum eldri - eitt sokallað: Syngi við kvøld!

Eitt sum hevur verið sera væl dámt hini árini eru barnamøtini - og stevnan í ár verður onki undantak. Nógv verður aftur í ár á stevnuni fyri børnini. Tiltøkini fyri børnini koma at verða yviri í Rhema, ið ikki liggur so langt frá høllini.

Og sjálvandi kemur eisini ungdómurin at fáa sítt við á stevnuni. Bæði leygarkvøldið 7. juni kl 22 og 1. Hvítusunnukvøld kl 22 verða spennandi tiltøk fyri tey ungu og onnur sum kenna seg ung. Ætlanin er seinna kvøldið at hava eina konsert.

Millum hús og miðlar í Dansistovuni

Ole Wich og Tórður Patursson frá Team85 seta framsýningina upp í Dansistovuni í Norðurlandahúsinum

Mynd. Jens Kristian Vang

Sosialurin og Dimmalætting sýna fram part av tí, ið hevur verið í bløðunum um Norðurlandahúsið seinastu 20 árini

FRAMSÝNING
Eirikur Lindenskov

Seinnapartin í gjár, hósdagin kl 15, lat upp framsýning í Dansistovuni í Norðurlandahúsinum, har Sosialurin og Dimmalætting í plakatformi vísa fram nakað av tí, sum hevur verið at sæð í bløðunum um Norðurlandahúsið og tiltøk í húsinum seinastu 20 árini.

Talan er bara um eitt úrval, tí skuldi alt tilfarið verið við, hevði tað fylt nógv meira.

– Hetta er ein framsýning, sum vit hava gjørt saman við Sosialinum og Dimmalætting fyri á tann hátt at vísa, hvussu tey hava umrøtt húsið hesi árini, sigur Birgir Kruse, samskipari í Norðurlanda-húsinum.

– Samstundis sýna vit fram lutir, sum hava verið nýttir til sjónleikir o. a. framførslu í húsinum hesi árini, sigur hann.

Innast í Dansistovuni hongu eitt relief, sum William Heinesen hevur gjørt. Tað kallast »Marran«, og sýnir tað fimm figurar, sum dansa um mánan. »Marran« var eisini myndaevnið á fyrstu ársplakatini hjá Norðurlandahúsinum í 1983.

Á framsýningini sæst eisini eitt friðingarskjal, sum Tórshavnar Býráð lat húsinum á tíggju ára degnum tann 8. mai í 1993. Har stendur m. a. skrivað:

»Hetta er friðingarskjal til fløtuna í Sortudiki, matr. nr. 1452a og skal frá hesum degi einki verða broytt ella bygt uttan at báðir partar vilja, at so skal vera.«

Skjalið er undirskrivað at Lisbeth L. Petersen, borgarstjóra í Havn.

Seinnapartin varð eisini ársplakatin fyri 2003 avdúkað. Hana hevur Bárður Jákupsson, listarmaður, gjørt, og er myndaevnið á henni »brúgvar« – tað sama sum var evnið í kantatuni hjá Karsten Hoydal og Vagn Holmboe til vígsluna í 1983. Tá sang kór undir leiðslu av Ólavi Hátún við 130 røddum kantatuna, og aftur til gallakonsertina í gjárkvøldið (hóskvøld) framførir kór undir leiðslu av Ólavi Hátún somu kantatu.

Framsýningin í Dansistovuni verður opin allan hendan mánaðin tá húsið er opið, gerandisdagar millum kl 10 og 18, sunnu- og halgidagar millum kl 14 og 18.

Maritim Lederuddannelse
Ansøgningsfrist: 16. maj 2003
I Rederiet A.P. Møller får du en maritim lederuddannelse med en verden af muligheder.
Officersaspirant hos A.P. Møller
Optagelsesprøver i Torshavn 28. maj 2003
DU søger udfordringer og karrieremuligheder i et internationalt miljø
- har hænderne og hovedet skruet rigtigt på
- har en studentereksamen, HTX, HF eller HHX med matematik (ansøgere med Folkeskolens Udvidede Afgangsprøve skal gennemgå Maritimt Forberedelseskursus)
- er almindelig god fysisk form og ikke farveblind
VI tilbyder dig en udfordrende og afvekslende uddannelse til skibsofficer, og en fremtid som officer i Rederiet A. P. Møller.
Uddannelsen kan påbegyndes hvert halvår, i slutningen af juli og i starten af januar. Der er stadig ledige pladser til næste hold.
Den teoretiske del af uddannelsen foregår på SIMAC i Svendborg, den praktiske om bord på rederiets skibe.
Rekvirer materiale og ansøgningsskema ved:
A.P. Møller Marine Department
Telefon +45 63 21 21 00
E-mail: cadet@maersk.com
Eller download ansøgningsskema på vores hjemmeside:
www.maritim-leder.dk
Rederiet A.P. Møller beskæftiger over 60.000 medarbejdere og har kontorer i mere end 100 lande.
A.P. Møller tråden teller over 250 skibe på omkring 12 millioner tons dødvægt, og omfatter container-, tanke-, bulk- og forsyningsskibe, samt specialskibe og borerigge.
MÆRSK

OSLO
1.45
Ein tíd og tvi korter. Sterag er í mánd, tá ið tú fløgur millum Vágar og Oslo.
Oslo er ikki høvuðsstaður Noregs av ongum. Bíturin bar 4 brá at vera stjóðs staður, tí mátti eina nakað er meistur av manglandi og mótsetningum. Her er ólíkt til stól. Aker Brygge er eitt av hugnaligastu stríðunum í Norðurevropa. Seriga tá ið tala um nutin reðar. Ristil mentanarliga arnars er bíturin ríkur. Vikingna Skipið hjá Edvard Munch er á norska tjóðfrásnarinnum, tí bert er eitt av 50 stevnum og listaskúlum, tú eru verd at vitja.
Tvey vikuferðir, tvey hótel og bilaleiga miðalag til leygardag, prísur úr
Kr. 8.595,-
ATLANTIC AIRWAYS